## Roknskaparleiðari

Til eitt handilsvirki við høvuðsæti í Tórshavn, verður søkt eftir einum roknskaparleiðara. Í bókhaldinum starvast frammanundan tvey fólk, men við vaksandi virksemi er tørvur á einum fólki afturat at standa fyri roknskapardeildini.

Arbeiðið umfatar alt vanligt bókhalds- og roknskapararbeiði og aðrar fyrisitingarligar uppgávur, sum hoyra til hetta.

Tann, ið setast skal í starvið, má hava góðan kunnleika til bókhald og roknskap og vera førur fyri sjálvstøðugt at leiða arbeiðið. Praktiskar royndir frá vinnulívinum eru tí ein treyt.

Løn sambært avtalu.

Starvið skal setast skjótast gjørligt. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaðir og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. juni 2002.

**RASMUSSEN & WEIHE**
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F
**An associated firm of** PRICEWATERHOUSECOOPERS

Á Glaðsheyggi
P.O. Box 30 — Sp/f nr. 267
FO-110 Tórshavn — e-mail:
Tlf. (+298) 311017 — rasmussen@rasmussen.fo
Fax (+298) 311018 — Http://www.rasmussen.fo

## Vit sóknast eftir

**fólki til fast starv til handilin**

**Arbeiðstíðirnar eru hesar:**

kl. 06.00 – 13.00
kl. 13.00 – 19.00
kl. 19.00 – 23.30
Allar dagar í vikuni

Løn eftir S&K

**P/F Frants Restorff**
**Tórsgøta 13**
**Postsmoga 41**
**110 Tórshavn**
**Tlf. 311060**

frants restorff

## Til allar skiparar

**Møguleiki at taka skipsføraraprógv í 1½ ár**

Nøkur pláss eru í skipsføraraflokkinum, sum byrjar 5. august.

Upptøkutreytirnar eru, at tú hevur skiparaprógv frá 1993 ella yngri. Eisini er møguleiki fyri at verða upptikin við øðrum líkastillaðum prógvi.

Umsóknirnar, sum skulu sendast til Føroya Sjómansskúla, Postboks 104, 110 Tórshavn, skulu vera inni áðrenn 15. juni 2002.

Nærri fæst at vita á tlf. 357500
ella t-post: farnav@farnav.fo

**Føroya Sjómansskúli**
Postboks 104 • FO-110 Tórshavn
Tlf. (+298) 357500 • Fax (+298) 357502
t-post: farnav@farnav.fo

*Føroya Sjómansskúli er av IMO (International Maritime Organization), Søfartsstyrelsen og Føroya Landsstýrið góðkendur sum útbúgvingarstovnur til sjóvinnuna.*

*Útbúgvingarnar, sum stovnurin hevur at bjóða, eru: Heimaskipari, skipari, skipsførari umframt eina røð av altjóða góðkendum skeiðum.*

## KUNNGERÐ

**frá útskiftingarnevndini**
**fyri Handastahaga í Sandavági**

Næsti útskiftingarfundur verður mikudagin 12. juni 2002 kl. 10 í Vakhúsi.

Nevndarlimir eru Jørleif Kúrberg, Tórshavn og Olaf í Garði Joensen, Eiði.

N.v.0

**MATRIKULSTOVAN**
Øssur A. Midjord
útsk. form.

## P/f Sveisingahandilin sóknast starvsfólk

**Vit sóknast eftir einum fólki til vørukoyring og goymsluna.**

Arbeiðið umfatar alla koyring av vøru, so sum koyring út til kundar, avheinta vøru á bryggjuni, gera vøru klára at senda.

Inni á goymsluni hevur tú ábyrgdina av at fáa vøruna til høldar, halda øki og bilarnar.

Fyrimunur er at tú hevur stóra koyrikorti.

Hevur tú spurningar hesum viðvíkjandi ring 311909 Bárður Simonsen.

Umsóknir til starvið skulu sendast til:

**P/F Sveisingahandilin**
Boks 18 • FO-110 Tórshavn
Att.: Bárður Simonsen

## Brúktur Proton 420 Diesel

**"Mitsubishi Lancer"**



**Proton 420 Diesel**
Árg. 04/00 Km. 106.000 Lit bláur met.
**kr. 117.000,-**
**Bilurin er í sera góðum standi**
**Bilfríðkan**
við Velbastaðvegin
Postboks 1034 - FO 110 Torshavn - Tlf 317300 - www.bilfridkan.fo



Atlas Copco

**STEMPIL OG SKRÚVU KOMPRESSARIR**

**Stationerir og transportablir størri samt smærri**

**Fáast í flestum støddum til øll endamál verkstøð. fiskavirkir, alibrúk, entreprenørar v.m.**

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008

## Bilur við frontskaða til sølu

**Merki:** VW Golf 1.6 D – 3 hurðar
**Árg.:** 1987
**Km:** 167.238

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Att.: Magni Petersen, sýnsmaður
tlf. 34 57 28
fax nr. 34 56 07
e-mail: mpe@trygging.fo

At hitta mánadag-hósdag millum kl. 08.30-10.00 og fríggjadag millum kl. 08.30-16.00.

**Sosialurin**
*Lesið Sosialin – tað loysir seg*



## KUNNGERÐ

**frá útskiftingarnevndini**
**fyri Kunoyar bygd**

Á nevndarfundi tann 23. mai 2002, hevur útskiftingarnevndin viðgjørt viðmerkingar til skjal nr. 13, býti uttangarðs og skjal nr. 14 eigaralistin innangarðs.

Við kennilsi er skjal nr. 13 og skjal nr. 14 staðfest við teimum broytingum nevndin hevur ásett á nevndarfundinum. Broytingarnar eru førdar í gerðabókina saman við endaligum kennilsi.

Uttangarðs býtið skjal nr. 13 og eigaralistin innangarðs skjal nr. 14, verða hervið latin serskilt til ákæru sbr. kap. 9 í útskiftingarlógini, og er kærufreistin 3 mðr. frá 1. juni 2002 at rokna. Víst verður til kap. 9 »Anke og gennemsyn« í útskiftingarlógini.

Kærur skulu vera skrivligar og stílast til Yvirútskiftingarnevndina, Sorinskrivarin, C. Pløjensgøta 1, Tórshavn, og verða honum í hendi 1. september 2002.

Skjølini og úrdráttur úr gerðabókini fyri útskiftingina, liggja frammi hjá Kunoyar kommunu og á Matrikulstovuni í Tórshavn til kærufreistin er úti.

Eigarar, sum hava gjørt viðmerkingar til skjal nr. 13 og skjal nr. 14, fáa kopi av skjølunum, kap. 9 í útskiftingarlógini og úrdrátt úr gerðabókini, har viðmerkingarnar eru viðgjørdar, sendandi.

Vegna útskiftingarnevndina, tann 28. mai 2002.

**MATRIKULSTOVAN**
Øssur A. Midjord
útsk. form.

**Oljumálastýrið**

## Vaskifólk søkist

Søkt verður eftir fólki at byrja 1. juli at gera reint í hølunum í Brekkutúni 1, Hoyvík, har Oljumálastýrið og Jarðfrøðisavnið húsast.

Umsóknarfreistin er 17. juni 2002.

Nærri fæst at vita á telefon 357070. Spyr eftir Jette Eirikstoft.

**Umsóknir skulu sendast til:**

**Oljumálastýrið**
Brekkutún 1 · Postsmoga 3059 · 110 Tórshavn
Tlf. 357070 · Fax 357075
e-mail: oms@oms.fo

## Rørsmiður søkist

Søkt verður eftir rørsmiði at byrja beinanvegin.

Áhugaðir biðjast ringja á tlf. 318023, svarar eisini um kvøldi.

**Sp/f V. V. S. Hornið**
Landavegur 2 • 100 Tórshavn

## Farmadeildin søkir SØLUFÓLK

Søkt verður eftir sølufólki til farmadeild okkara.

***Arbeiðsuppgávur:***
Uppsøkjandi søluarbeiði, herundir søla av tænastum innan farma-flutning og kundarøkt.

***Førleiki:***
Tann, ið settur verður, skal hava góð samstarvsevni og helst hava royndir í søluarbeiði.
EDV-kunnleiki á brúkarastøði er ein treyt.

***Løn:***
Sambært avtalu.

Starvið verður at seta skjótast til ber.

Meira fæst at vita við at ringja tel. 345962/ 63 og spyrja eftir Jónfinni ella Heðini.

Umsókn við møguligum prógvum og upplýsingum um royndir annars skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 17. juni 2002.

**SMYRIL LINE CARGO**
**Postsmoga 370 • 110 Tórshavn**

## Brúktur Seat Arosa Diesel

BESTA BRÚKTBILAFIGGING Í LANDINUM SÍ HEIMASÍÐUNA WWW.BILFRIDKAN.FO



**Seat Arosa Diesel**
Árg. 11/99 km. 64.000 litur metal grønur
útgjald 21.000,- / 105.000,-
Bilurin er í sera góðum standi, sum nýggjur.
**Bilfríðkan**
við Velbastaðvegin
Postboks 1034 - FO 110 Torshavn - Tlf 317300 - www.bilfridkan.fo

***Vegna fáar umsóknir verður starvið lýst av nýggjum***

## Leiðari til Føroya Barnaheim

Søkt verður eftir leiðara til Føroya Barnaheim at byrja 1. juli 2002 ella skjótast tilber.

Føroya Barnaheim er sjálvsognarstovnur. Á Barnaheiminum er í løtuni ein Ungdómsdeild við 6-7 børnum. 7 starvsfólk eru á deildini. Á Barnaheiminum er harafturat skrivstovuhjálp og húsavørður hálva tíð. Verandi leiðari er fyribilssettur.

Frá 1. august í ár verður sett á stovn Familjudeild, har foreldur og børn kunnu búgva í styttri tíðarskeið. Væntandi kunnu upp til 4 familjur vera á deildini í senn. Søkt hevur verið eftir 10 starvsfólkum til deildina.

Ætlandi verður eisini ein Smábarnadeild latin upp í næstum at taka ímóti børnum frá 0-12 ár.

Føroya Barnaheim er ein stovnur, sum við umsorgan, eygleiðing og viðgerð skal virka fyri at skapa trygg og mennandi kor fyri børn, ung og foreldur, meðan tey eru á heiminum. Hetta skal gerast í tøttum samstarvi við familjuna, barnavernd, stovnar og fakfólk annars við tí endamálið at geva innskrivandi barnavernd betri møguleikar at meta um støðuna hjá barninum/familjuni og møgulig framhaldandi hjálpartiltøk.

Leiðarin hevur fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av stovninum.

Tíðandi partur av starvinum sum leiðari er samstarv við avvarðandi, barnaverndir, myndugleikar, skúla, ansingarstovnar, heilsuverk umframt fakfólk og onnur, ið varða av barninum/familjuni.

Dentur verður lagdur á, at tann, ið settur verður, hevur góð leiðaraevni, hevur áræði og dugir at ganga nýggjar leiðir, dugir at samstarva við ymisku fakbólkarnar og at skapa eitt mennandi umhvørvi fyri tey, sum búgva á heiminum, og starvsfólkini.

Til starvið krevst útbúgving sum sálarfrøðingur, pedagogur, sosialráðgevi við eftirútbúgving innan leiðslu og familjuterapi ella onnur líknandi útbúgving. Dentur verður lagdur á starvsroyndir.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi fakfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Fríðu Patursson á telefon 319727 eftir kl. 17.00.

Skrivlig umsókn við prógv, viðmælum, v. m. skal vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 14. juni 2002 kl 14.00.

**Stýrið fyri Føroya Barnaheim**
Pedda við Steinsgøta 10
FO-100 Tórshavn

**ADC-Heilsølan**
*Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*

**ARBEIÐSHANDSKAR**
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*

**LANDSINS STØRSTA ÚRVAL**
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*

**BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA**